## VIÐMERKINGAR

# Gevið orðabókasmiðum tað ið orðabókasmiðanna er

### Áheitan á mentamálaráðharran

HØGNI HOYDAL



**– Tað kveikti eina ávísa vón, tá landsstýrismaðurin í mentamálum herfyri kunngjørdi, at hann veitti eina serliga heiðursløn til Jón Hilmar Magnusson fyri sítt sjálvbodna arbeiði við fyrstu íslendskt-føroysku orðabókini, skrivar Høgni Hoydal**

Veruleikin er jú, at føroyskt orðabókaarbeiði altíð hevur verið gjørt av sjálvbodnum eldsálum. Alt ov lítið hava vit virt handverkararnar, verkfrøðingarnar, dekkararnar og maskinmeistararnir, ið hava skapt okkum øllum møguleikan at sigla inn í nútímans heimin og út á altjóða mentanarligu høvini á okkara egnu málsligu og mentanarligu skútu. Og alt ov lítið hava vit virt urtagarðsfólkini, ið sáa og taða fyri nýggjum blómum í okkara málsliga urtagarði.

Vit kunnu fara heilt aftur til tey fyrstu, ið savnaðu inn sagnir, kvæði og søgur og skrivaðu orðalistar. Og vit kunnu leita fram til nútímans pionérar frá Christiani, Mads Andriasi, Jóannesi, Jóhan Hendrikki, Hjalmari, Ulf, Sigurði, Turið, André, Johnny, Jonhardi, Anfinni, Zakariasi, Henningi, Gianfranco...og nú havi sjálvsagt lagt onkran burturímillum. Umberi meg fyri tað.

Eg vóni, at avgerð mentamálaráðharrans um at viðurkenna sjálvboðið orðabókaarbeiði, er tekin um, at nú verður veruliga farið undir at stuðla og heiðra okkara orðabókasmiðum.

Eg vóni, at játtanin til orðabókagerð á fíggjarlógini, sum varð munandi hækkað í ár 2000, men sum seinastu árini er skorin niður á bein, verður at vaksa miðvíst aftur.

Eg vóni, at Gianfranco fær boð frá landsstýrinum við ein umbering fyri, at hann varð vístur av landinum og tilboð um at koma aftur at arbeiða víðari.

Eg vóni, at stuðulin til at geva út sjálvboðið orðabókaarbeiði verður styrktur.

Og uttan at seta nakað niður á onnur, so vóni eg at Anfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen, sum seinastu árini sjálvbodnir hava arbeitt fyri sjey og hava ríkað okkum við orðabókum á prenti, á fløgu og við støðugt dagførdum útgávum á alnetinum, verða virdir og eggjaðir við viðurkenning og stuðli.

Málið er ikki bert eitt amboð. Málið er sjálvt portrið inn í heimin, har vit gerast menniskju, læra, skilja og mennast. at gerast menniskja. Í málinum skapast og rúmast virðir og royndir hjá undanfarnum ættarliðum. Og í málinum skapast og rúmast framtíðin.

Tað hevur alla tíð verið og verður altíð eitt stríð, sum ikki gevur peningaligt avkast til ta einstøku eldsálina at menna føroyska málið. Orðabókaarbeiði snýr seg ikki um at varðveita føroyska málið. Tað snýr seg um støðugt og hvønn dag at menna tað og halda tað livandi, so tað kann gerast karmur um allar tættir hjá menniskjum í einum samfelag, sum broytist hvønn dag.

At hava føroyskar orðabøkur beinleiðis úr og í onnur mál, er fortreytin fyri, at føroyskt kann mennast í javnbjóðis samskifti við onnur mál og aðrar mentanir – og at vit kunnu vaksa og taka lut í altjóða heiminum.

At vit nú hava hesar samskiftismøguleikarnar millum føroyskt og fleiri heimsmál, hevði neyvan nakar trúð, tá farið varð undir at savna og skriva niður tekstir í 19. øld. Tá roknaðu tær eldsálirnar við, at tær savnaðu inn forminnisgripir, ið skuldu varðveitast á savni.

Í dag stendur okkum og komandi ættarliðum í boði at læra heimsmál og smærri mál gjøgnum føroyskt. Mín vón er, at okkara børn innan næstu 10 árini læra 4-5 heimsmál longu í barnaskúlanum.

At hetta gerst møguligt er ikki einum miðvísum mentanarpolitikki fyri at takka (ongin politiskur flokkur undantikin). Tvørturímóti er tað ímóti øllum forsagnum og ímóti øllum forðingum, at eldsálirnar hava hildið á.

Nú má stundin vera komin at virða tað. Og lat okkum fyri alt í verðini ikki lata eldsálirnar vera fyri mismuni og vanbýti.

# Óseriøsar tryggingar?

MORTAN POULSEN
Stjóri, Tryggingarfelagið Føroyar



**– Stjórin í Trygd, Ali Celebi, hevur fyrst í Dimmalætting og nú eisini í Sjónvarpinum lagt Tryggingarfelagið Føroyar undir at reka óseriøst tryggingarvirksemi við tilboði um ókeypis barnavanlukkutryggingar. Hesum má Tryggingarfelagið Føroyar vísa aftur, tí einki hald er í hesum, sigur Mortan Poulsen, stjóri hjá Tryggingarfelagnum Føroyar**

Nú Tryggingarfelagið Føroyar er komið á marknaðin við einum serstakliga góðum tilboði upp á barnavanlukkutryggingar, tykist tilboðið tó vera so gott, at ovasta leiðsla í Trygd hevur hug at geva ilt av sær.

Í øllum førum hevur stjórin í Trygd, Ali Celebi, í tveimum førum innan fyri eina góða viku lagt Tryggingarfelagið Føroyar undir at reka óseriøst tryggingarvirksemi. Orsøkin til tað skal vera tilboð okkara um barnavanlukkutryggingar, ið vit geva fólki møguleika at tekna á tann hátt, at fyrsta árið er ókeypis.

Fyri tað fyrsta eru slík tilboð einki óvanligt, hvørki innan tryggingarvirksemi ella aðrar vinnur, og ei heldur eru slík tilboð ókend í Føroyum. Í grannalondum okkara finnast dømi um tilboð av sama slagi, har barnavanlukkutryggingar kunnu teknast ókeypis undir ávísum treytum.

Tað er heldur ikki óvanligt, at eitt nú bløð royna at draga nýggjar haldarar til við tilboðum, ið lata fólk fáa blaðið ókeypis restina av einum ársfjórðingi, um nýggj hald verða teknað innan ávísa tíðarfreist.

Einki óvanligt ella óseriøst er við slíkum introduktiónstilboðum, og heldur ikki liggur nakað óseriøst aftan fyri góða tilboðið frá Tryggingarfelagnum Føroyum. Tvørturímóti fáa øll okkara viðskiftafólk bjóða eina sera vælvirkandi barnavanlukkutrygging.

Fyri kortum kom fram, at nógv føroysk børn í skúlaaldri ikki eru tryggjað. Tí valdu vit at bjóða foreldrum eitt gott tilboð, tí eftir okkara tykki eigur tað at vera líka sjálvsagt at tryggja seg sjálvan og børnini móti vanlukkutilburðum, sum tað er at tryggja hús, bil og annað.

Júst hetta við at bjóða nýggjum viðskiftafólkum ókeypis tryggingar átti ikki at verið ókent hjá Trygd. Sum dømi kunnu vit nevna, at millum annað í sambandi við nýbygging av sethúsum hevur Trygd sett fram tilboð um, at øll, ið vóru við í eini útstykking, skuldu fáa ókeypis sethúsatrygging tað fyrsta árið, um tey valdu at taka av tilboðnum frá Trygd.

Tí undrar tað okkum ikki sørt, at Ali Celebi fyrst í Dimmalætting og síðani í Degi og viku velur at leggja Tryggingarfelagið Føroyar undir óseriøsitet.

Tryggingarfelagið Føroyar er bert komið við einum góðum tilboði, ið enntá er galdandi restina av árinum. Hetta er eitt seriøst tilboð og eitt tilboð, vit standa við!

*mp@trygging.fo*

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Stuðulsskipanin fyri vaksin*

## Sosialráðgevi

### til stuðulsskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum sosialráðgevi á Stuðulsskipanini fyri vaksin, undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst.

Stuðulsskipanin fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.

Talan er um avloysarastarv í tíðarskeiðnum: 1. apríl – 31. desember 2006.

**Starvsuppgávur:**
- At ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum og stovnum
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit søkja eftir einum starvsfólki, ið:**
- Hevur vitan og royndir innan sosiala øki
- Hevur áhuga at arbeiða við brekaðum
- Dugir at skapa positivt og virðiligt samband við brúkaran
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Er sálarliga væl fyri og dámar avbjóðingar
- Er uppfinningarsamur og dugir at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøki fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðusskipanin fyri vaksin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Stuðulsskipanina á tlf. 354020 og tosa við Regin Johansen, leiðara ella við Odu M. Jóhansdóttir, varaleiðara.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Regin Johansen, leiðara
Løkjatún 1
160 Argir

**Umsóknarfreist: 26. februar 2006.**

